# Fyrsti føroyski oljufilmurin frumsýning í London

FILMUR
*Jan Müller*

Tað skuldu blíva føroyskir útisetar í Bretlandi, sum vórðu tey fyrstu at síggja spildurnýggja filmin, sum Statoil hevur latið gera av fyrstu oljuboringini við Føroyar nakrantíð, boringini við Sovereign Explorer fyri góðum árum síðani. Hetta hendi seinasta týskvøld, tá samkoma var fyri føroyskum útisetum í Bretlandi.

Filmurin varir í umleið 25 minuttir og verður fylgt við arbeiðinum hjá Statoil í Havn í sambandi við fyrireikingarnar beint undan boringini og sjálvum boriarbeiðinum umborð frá byrjan til enda. At henda boringin ikki endaði við einum fundi, sum mong høvdu vónað, er so ein annar spurningur.

– Tað vóru 29% sannlíki fyri at finna olju og 71% fyri ikki at treffa við olju segði Rúni Hansen, stjóri í Statoil, tá hann greiddi frá arbeiðinum hjá felagnum í Føroyum og framtíðar útlitum. Í framløgu síni legði hann annars stóran dent á tann mest týðandi spurningin í føroyskari oljuleiting í framtíðini, nevniliga hvussu basaltknúturin kann loysast skjótt og væl sum hann tók til.



*Rúni Hansen, stjóri í Statoil greiðir frá*



*Føroyingar í Bretlandi fingu høvi at síggja fyrsta føroyska oljufilmin*









# Hatta mátti Høgni Hoydal roknað við

**Annlis Bjarkhamar skuldi havt tosað við tjóðveldisflokkin, áðrenn hon tók eina so umstrídda avgerð sum at seta landsantikvar beint ímóti innstillingini, heldur Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi**

LANDSANTIKVARUR
*Áki Bertholdsen*



*– Málið um landsantikvarin, er eitt mál, har øll standa spyrjandi og tí er ikki annað væntandi enn at tinglimir siga sína hugsan, serliga tá ið leiðslan í flokkinum er so tigandi, sigur Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi*

– Tá ið leiðslan í tjóðveldisflokkinum onki vil siga, kann ikki roknast við øðrum, enn at onkur tingmaður loysir frá posanum.

Heini O. Heinesen, sum er formaður tjóðveldisfloksins á tingi, heldur ikki at tað er nakað at undrast á, at Tórbjørn Jacobsen løgtingsmaður í Sosialinum í farnu viku loysir frá posabandinum í sambandi við málið um landsantikvarin.

Tórbjørn Jacobsen fýltist á, at leiðslan í tjóðveldisflokkinum var so tigandi, nú Annlis Bjarkhamar hevur fingið trupulleikar tí at hon setti Steffen Stumman Hansen í starv sum landsantikvarur heldur enn Símun Arge, sum setanarnevndin eimælt innstillaði til starvið heilar tvær ferðir. Hinvegin svaraði formaður floksins, Høgni Hoydal, at hann hevði ikki hoyrt Tórbjørn Jacobsen bera hesi sjónarmiðini fram innanfloks.

Heini O. Heinesen vil sum so ikki leggja seg út í trætuna ímillum Tórbjørn Jacobsen og formann floksins, Høgna Hoydal.

Men hann vísir á, at setanin av nýggjum landsantikvari er eitt umstrídd mál og tí er tað onki undarligt, at tingfólk siga sína hugsan.

– At tingfólk siga sína meining er ikki annað enn væntandi, tá ið leiðslan í flokkinum tegir, sigur Heini O. Heinesen.

Hann sigur, at hann er avgjørt ikki fyri at múlabinda tingfólk og tað ber ikki til at undrast á, á, at onkur av tingmanningini brýtur út, tá ið floksleiðslan ikki letur við seg koma.

– Tingfólk eiga avgjørt at hava loyvi til at siga sína hugsan, hóast tey ikki eru samd við leiðsluna í flokkinum, ella við flokkin annars, sigur formaðurin fyri tjóðveldisflokkin á tingi.

– Í hesum føri er talan um eitt mál, har øll standa spyrjandi og tí er onki undarligt, at Tinglimir siga sína hugsan, tá ið leiðslan í flokkinum ikki ger tað.

– Men sjálvsagt er altíð betri at mál verða viðgjørt innanfloks, leggur hann afturat.

### Løgin avgerð

Annars vil Heini O. Heinesen sum so ikki siga so nógv um sjálva starvssetanina.

Men hann minnir á, at Annlis Bjarkhamar hevur sagt, at hon var greið yvir, at tað fór at elva til trupulleikar tá ið hon setti Steffen Stumman Hansen framum Símun Arge, sum setanarnevndin mælti til.

– Og tað tykir mær løgið, at hon skal hava tikið eina so umstrídda avgerð, uttan at hava ráðført seg við flokkin.

Heini O. Heinesen heldur avgjørt, at Annlis Bjarkhamar átti at havt tosað við flokkin, áðrenn hon tók eina avgerð um at ganga ímóti eini samdari setanarnevnd.

– Men tað hevur hon ikki gjørt. Um hon hevur ráðført seg við einstaklingar í flokkinum, veit eg ikki, men flokkin hevur hon ikki tosað við.

Serliga, nú Annlis Bjarkhamar er so óroynd í politikki, átti hon at spurt onnur til ráðs, leggur Heini O. Heinesen afturat.

Annars heldur hann, at tað er skeivt at nevna tað setanarnevnd, tí tað skerst heldur ikki burtur, at Annlis Bjarkhamar hevur óskerdan rætt at seta starvið. Men tá ið avgerðin var so umstrídd, átti hon at havt ráðført seg við onkran í flokkinum.

Hann vísir m.a. á, at Símun Arge hevur ein ávísan starvsaldur, hann hevur stuðul frá starvsfólkunum so tað skulu sera góðar grundir til at vraka hann.

### Ein natúrlóg

Í Sosialinum í farnu viku finst Høgni Hoydal eisini at løgmanni fyri at gera mismun á Landsstýrisfólkum, tí hann hevur ikki hoyrt løgmann úttala seg um landsstýrisfólk hjá fólkaflokkinum, sum hann hevur úttalað seg, nú Annlis Bjarkhamar málið hevur tikið seg upp.

Men her er Heini O. Heinesen ikki heilt samdur.

– Tað er næstan ein natúrlóg, at ein og hvør løgmaður verður meiri atfinningarsamur ímóti landsstýrisfólkum úr øðrum flokkum enn sínum egna. Soleiðis er politikkur nú einaferð, sigur Heini O. Heinesen.

# Løgmaður viðgerð kæru um uppsagnirnar í heimarøktini

**Løgmaður viðgerð kæruna frá Sinnisbata um uppsagnirnar í heimar-ktini, men hvat úrslitið verður, veit hann ikki**

HEIMARØKTIN
*Áki Bertholdsen*



*Løgmaður viðgerð allar kærir hann fær og nú fer hann eisini at viðgera kæruna frá Sinnisbata um umsagnirnar í heimarøktini*

Løgmaður fer nu at viðgera kæruna, sum Sinnisbati hevur sent honum um uppsagnirnar í heimarøktini.

Sinnisbati hevur kært til løgmann eftir at tríggir leiðarar í heimarøktini hava sagt upp.

Sinnisbati sigur, at uppsagnir í felag boða frá, at alt ruggar ikki rætt.

Ein av teimum, sum hevur sagt upp er Hilda Viderø, sum var samskipari á sálarfrøðiliga økinum og nú, hon hevur sagt upp, er tað, sum er arbeitt upp á sálarfrøðiliga økinum bumbað fleiri ár aftur í tíðina, sigur Sinnisbati í skrivi til løgmann.

Tí heitir felagið álvarsliga á løgmann um at kanna uppsagnirnar.

Og løgmaður fer nú at viðgerða kæruna.

– Allar kærir, sum Løgmaður fær, verða viðgjørdar, sigur hann.

Men hann veit ikki, nær ein niðurstøða um kæruna verður tikin ella, hvat úrslitið verður, Tí veit hann heldur ikki um hetta gevur honum orsøk til at fara víðari við málinum.

Annars hevur hann ikki fleiri viðmerkingar til málið nú. Men hann minnir á, at talan er um trý fólk, sum hava sagt seg úr starvi og at tað hava tey fullan rætt til, tí vit búgva í einum fríum landi.

Umframt Sinnisbata, hava fimm økisleiðarar í heimarøktini gjørt vart við seg í bløðunum um uppsagnirnar.

Og teir meta støðuna so álvarsliga, at í ringasta føri kann hetta hava við sær, at heimarøktin sindrast.

# Løgmaður ger ikki mismun

LANDS-ANTIKVARUR
*Áki Bertholdsen*

Løgmaður hevur ongar viðmerkingar til atfinningarnar frá varaløgmanninum, Høgna Hoydal í Sosialinum leygardagin um embætisførsluna hjá landsstýrisfólkum.

Høgni Hoydal helt, at løgmaður gjørdi mismun á landsstýrisfólkum, tí hann var meiri atfinningarsamur ímóti Annlis Bjarkhamar enn hann hevði verið, tá ið embætisførslan hjá landsstýrismonnum hjá fólkaflokkinum var til viðgerðar.

– Eg havi ongantíð hoyrt løgmann úttala seg so um landsstýrismenn hjá fólkaflokkinum soleiðis sum hann nú úttalar seg um Annlis Bjarkhamar.

Høgni Hoydal sipar til málið um embætisførsluna hjá Jørgen Niclasen, tá ið hann legði frá sær og til John Petersen-málið, tí í hesum báðum førum var var Løgmaður meiri tigandi.

Men nú Annlis Bjarkhamar hevur sett landsantikvar, hevur løgmaður alment boðað frá, at framferðin hjá henni er til óbótaligan skaða og at málið er sera álvarsligt.

– Nei, eg havi ikki gjørt mismun á landsstýrisfólkum. Eg havi heldur ikki úttalað meg alment um, hvussu Annlis Bjarkhamar handfór málið um setanina av landsantikvari. Tað einasta, eg havi gjørt, er at eg havi svara nøkrum fyrispurningum á Føroya Løgtingi og tað er hvør sítt, sigur Anfinn Kallsberg.